# ítróttur

Nr. 40 • leygardagur • 26. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# VÍF kann gerast meistari sunnudagin

**Gongur tað eftir vild hjá vestmenningum, so kunnu teir longu sunnudagin rópa seg føroyameistarar í manshondbólti 2005**


ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Vinnur VÍF heimadystin móti Neistanum sunnudagin, kann væl verða, at teir longu tá verða krýndir sum meistarar*

Um væl vil til hjá VÌF, so er møguleiki fyri, at teir longu í fjórðsíðsta leikumfarinum, sum verður sunnudagin, tryggja sær føroyameistaraheitið. Tað er nevnliga so, at um nærmastu kappingarneytarnir úr Kyndli, sum leygardagin spæla móti KÍF, missa stig, so kann VÍF tryggja sær meistaraheitið við at vinna á Neistanum í Vestmanna sunnudagin.

### Silvurbrak

Tað eru neyvan mong, ið undan kappingarárinum í ár høvdu gitt, at tá ið KÍF og Kyndil í fjórðseinasta dystinum í ár hittust, fór tað at verða ein dystur millum tvey lið, ið stríðast um silvurmerkini. Uttan at taka nakað frá KÍF, so er tað rættuliga óvæntað, at teir liggja so mikið ovarlaga á stigatalvuni, og vinna teir á Kyndli leygardagin, so er KÍF bráddliga næstfremsta liðið í Atlantic Airways kappingini.

Um hugt verður eftir dagsforminum, so er einki yvir at dylja, at hann er til fyrimuns fyri kollfirðingar. KÍF hevur fingið góða úrtøku í seinastuni, meðan Kyndil hevur tapt fimm dystir á rað, um vit rokna steypakappingina uppí.

Tað man heldur ikki verða nakar ivi um, at kollfirðingarnir eru meiri svangir eftir silvurinum enn teir annars so sigursvandu kyndlamenninir.

### Gulldeymur í Vestmanna

Um tað skuldi hent seg, at kollfirðingar tóku stig frá Kyndli, so er vegurin slóðaður fyri vestmenningum at tryggja sær gullið sunnudagin. Um so er, at VÍF longu í fjórðseinasta leikumfarinum tryggjar sær gullið, kann ikki annað sigast, enn at tað er eitt framúr gott avrik at verða so suverenur meistari.

Sum tey flestu vita, hava vestmenningar verið nakað skerdir til seinastu dystirnar, tí at brøðurnir báðir Áki og Ingi Olsen, umframt Áki G. Olsen allir hava verið skaddir, men tað hevur ljóðað, at Áki G. verður við aftur sunnudagin, men hesi tíðindi eru ikki váttað. Ikki tí, hóast tey flestu høvdu væntað, at liðið hjá vestmenningum fór at falla saman orsaka av skaðunum, so hendi tað beint øvugta. VÍF fór á vøllin sum ein eind, og sum málverjin Eli Müller málbar seg, so lyftu teir allir í felag, og tað hevur rokkið langt.

Tað er tó eingin, sum sigur, at vestmenningar longu hava vunnið dystin móti Neistanum, tí hóast Neistin er aftast í landskappingini, so hevur liðið roynst væl betri í seinastuni, enn teir hava gjørt fyrr í ár. Neistin vann herfyri á Kyndli, og teir vóru akkurát við undirlutan móti KÍF.

At vestmenningar fara at sita spentir og bíða eftir úrslitinum av dystinum millum KÍF og Kyndil í Hoyvík leygardagin er greitt, og so er spurningurin, um teir fara at gera champagnufløskur klárar til sunnudagin.

### Hoyvíkingar á Skála

Seinasti dysturin í Atlantic Airways kappingini um vikuskiftið verður á Skála sunnudagin, har StÍF fær vitjan av H71. Dystirnir millum júst hesi bæði lið eru ofta rættuliga javnir og spennandi, men tað tykist sum um, at strandingar hava fingið eitt sindur av viðrák, eftir at teir gjørdust steypavinnarar, meðan hoyvíkingar hinvegin tykjast verða steðgaðir eitt sindur upp.

Undir øllum umstøðum kunnu vit staðfesta, at talan verður eitt sera spennandi umfar í Atlantic Airways kappingini, har vit møguliga sleppa at kjósa føroyameistaran, og kanska fáa vit eisini ein greiða ábending um, hvussu býtið av hinum heiðursmerkjunum fer at verða.

## Dystaryvirlit

**Flogbóltur: Sunnudagin 27/2**
**Meistaradeildin kvinnur:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 14.00 | Dráttur – Mjølnir | Giljanes |
| Kl. 14.00 | ÍF – TB | Kambsdalur |

**Meistaradeildin menn:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 15.00 | Fleyr – Mjølnir | Gundadalshøllin |
| Kl. 16.00 | Fram – SÍ | Hoyvíkshøllin |

**Hondbóltur: Sunset-kappingin: 27/2:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 14.30 | StÍF – Søljan | Skála |
| Kl. 14.30 | VÍF – Neistin | Vestmanna |
| Kl. 15.00 | Stjørnan – Tjaldur | KÍ-høllin |
| Kl. 15.00 | VB – Kyndil | Høllin í Vági |

**Atlantic Airways-kappingin: 26/2:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 16.00 | KÍF – Kyndil | Hoyvíkshøllin |

**27/2:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 16.00 | VÍF – Neistin | Vestmanna |
| Kl. 16.00 | StÍF – H71 | Skála |

# Gyltir sørvingar

**Mansliðið hjá SÍ kann við einum sigri á Fram sunnudagin tryggja sær flogbóltsgreipuna í ár, hóast fleiri umfør eru eftir at spæla**


FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Sørvingar hava verið suverenir í mansflogbóltinum í ár, og tað er líkt til, at teir longu sunnudagin kunnu rópa seg greipuvinnarar 2005. Tvær vikur eru síðani, at SÍ í stórum stíli tryggjaði sær sigurin í steypakappingini, og sunnudagin kunnu sørvingar við einum sigri á Fram í Hoyvíkshøllini tryggja sær føroyameistaraheitið og harvið greipuna.

### Ikki tapt síðani oktobur

At SÍ hevur verið einaráðandi í kappingini í meistaradeildini hjá monnum sæst serliga væl, um hugt verður eftir úrslitunum higartil í ár. Sørvingar hava ikki tapt nakran dyst, síðani teir vóru fyri einum ósigri móti Mjølnir í Klaksvík tann 17 okt. í fjør.

Tað er óivað fleiri orsøkir til, at SÍ hevur staðið seg so væl í ár. Útskiftingin á liðnum hevur ikki verið lítil og eingin, men hinvegin hava teir báðir útlendingarnir, leikandi venjarin Rajko Petrovic og Borko Ilic, báðir havt eitt framúr gott kappingarár, helst tað besta síðani teir báðir komu til landið.

Harafturat hava fleiri av teimum yngru leikarunum fingið eitt sindur fleiri royndir, og hesar royndir hava nógv at siga í teimum avgerandi dystunum. Tað slepst heldur ikki undan at nevna liðskiparan, Jón Nielsen, sum í ár kanska hevur havt sítt besta kappingarár nakrantíð. Møguleikarnir hjá SÍ fyri at basa Fram í Hoyvík sunnudagin eru sera góðir. Teir tríggjar innanhýsis dystirnar, sum liðini hava spælt móti hvørjum øðrum higartil í kappingarárinum, hevur SÍ vunnið allar. Tveir teir fyrstu vunnu sørvingarnir 3-0, men tann seinasta, ið var í Sørvági fyri trimum vikum síðani, vann SÍ "bert" 3-1.

Hin dysturin í fremstu flogbóltsdeildini hjá monnum hetta vikuskifti verður millum tey bæði liðini, ið stríðast um silvurmerkini. Tað eru Fleyr og Mjølnir, sum hittast í Gundadalshøllini.

Støðan er í løtuni tann, at Fleyr er eitt stig framman fyri Mjølnir, og tí kunnu klaksvíkingar við einum sigri í Havn sunnudagin endurvinna silvurplássið, sum teir mistu fyri fáum vikum síðani. Hinvegin tykist tað sum um, at Mjølnir eru punkteraðir, síðani teir taptu fyrst landskappingardyst í Sørvági og síðani steypafinaluna móti SÍ fyri tveimum vikum síðani.

**SUNSET KAPPINGIN**

KVINNUR

| | dystir | v | j | t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 | 0 | 0 | 432 | 329 | 103 | 19 |
| 2 VB | 2 | 2 | 0 | 0 | 527 | 312 | 215 | 17 |
| 3 Neistin | 3 | 1 | 0 | 2 | 465 | 377 | 88 | 12 |
| 4 Søljan | 2 | 2 | 0 | 0 | 429 | 368 | 61 | 12 |
| 5 VÍF | 3 | 1 | 0 | 2 | 391 | 397 | -6 | 7 |
| 6 StÍF | 3 | 1 | 0 | 2 | 389 | 436 | -47 | 7 |
| 7 Kyndil | 3 | 1 | 0 | 2 | 341 | 452 | -111 | 5 |
| 8 Tjaldur | 3 | 0 | 0 | 3 | 264 | 567 | -303 | 0 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**

MENN

| | dystir | v | j | t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 | 0 | 1 | 473 | 423 | 50 | 18 |
| 2 Kyndil | 6 | 2 | 0 | 4 | 470 | 397 | 73 | 12 |
| 3 KÍF | 6 | 3 | 1 | 2 | 407 | 433 | -26 | 11 |
| 4 StÍF | 6 | 3 | 2 | 1 | 422 | 452 | -30 | 11 |
| 5 H71 | 6 | 2 | 0 | 4 | 459 | 469 | -10 | 9 |
| 6 Neistin | 6 | 1 | 1 | 4 | 441 | 498 | -57 | 6 |